## Leiðreglur fyri arbeiðsbýti millum megindeild og setursskrivstovu í sambandi við uttanseturs fíggjaðar verkætlanir

**Samtyktar av setursráðnum 17.6.99**

Megindeildin:
Tá søkt verður um uttanseturs fígging, skal megindeildarformaðurin góðkenna:
- at verkætlanin fakliga hoyrir heima á deildini,
- at hon letur seg gera við tøka útbúnaðinum v.m. ella at meirkostnaður av slíkum tørvi fylgir við verkætlanini,
- at verkætlanin ikki skerjir virksemið á deildini annars.

Vegleiðari ella megindeildarformaður hava ábyrgd av, at tíðarfreistir verða hildnar sbrt. avtalu - eisini v.v. rapporteringsskyldum.

Setursskrivstovan:
Skal endaliga góðkenna fíggjarætlanina.
Hevur fíggjarstýringina av verkætlanini.
Tekur sær av starvsfólkaspurningum t.d. í sambandi við lønarflokking, sjúku.

Øll nýtsla av peningi verður framd við ávísingum.
Setursskrivstovan stovnar undirrakstrarstað á Gjaldstovuni til verkætlanina.

Fróðskaparsetrið hevur fíggjarligu ábyrgdina av verkætlanini.